# U17-kvinnur til NM




Við flúgvaranum hjá Atlantic Airways í morgun fóru 12 U-17 landsliðsleikarar í flogbólt til Finnlands, har tær skulu taka lut í kappingini um Norðurlendska Meistaraheitið. Gent若urnar skulu á ferðini leika ímóti Danmark, Íslandi, Noreg, Svøríki og Finnlandi. Fyrstu dystirnir eru fríggjadagin og kappingin endar sunnukvøldið. Liðið verður aftur í Føroyum mánadagin. Leikararnir á liðnum eru: Birgit Guttesen, SÍ, Vivian Joensen, SÍ, Manja Johansen, TB, Eina Kalsø, Mjølnir, Elisabeth Purkhús, Mjølnir, Sofía Purkhús, Mjølnir, Brynhild Dam, Fleyr, Simonika Hammer, Fleyr, Karina Pálsdóttir Debes, Fleyr, Anja Sonnadóttir Danielsen, Fleyr, Sonja Thomassen, KÍF og Sóley M. Poulsen, KÍF. Venjarar eru Herman Lindberg og Rosa Jacobsen

# Einki avboð frá Jón Róa

**Hóast AaB-heimasíðan í gjár segði, at Jón Rói Jacobsen hevði givið avboð til Litava-dystin, so stendur navn hansra enn á pappírinum**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, sigur, at enn er ikki endaliga greitt, um Jón Rói er tøkur til dystin.

- At byrja við bóru tey í AaB ótta fyri, at talan kundi vera um okkurt brot í fótinum, eftir at Jón Rói keikti fótin undir venjing.

- Somikið álvarsligt er tað tíbetur ikki, og vit vóna, at hann verður førur fyri at spæla. Endaliga avgerðin um, hvørt Jón Rói er við í hópinum ella ikki, verður helst ikki tkin fyrr enn leygarkvøldið, sigur føroyski landsliðsvenjarin.

# Áskoðari fekk treytaðan dóm

Dómur fall týsdagin í málinum um áskoðaran, sum rann inn á vøllin og sló dómaran í landsdystinum millum Danmark og Svøríki 2. juni í ár. Hann var dømdur fyri harðskap og fyri ólógliga at bróta inn á vøllin. Revsingin gjørdist 40 tímar samfelagstænasta og ein treytað revsing í 30 dagar. Rætturin metti, at maðurin hevði verið sálarliga óstøðugur, tá hendingin fór fram, og hetta var orsøk til, at maðurin fekk somikið lina revsing. Ákæruvaldið hevði kravt, at maðurin fekk mundandi harðari revsing og at henda ikki var treytað. Eisini eitt sivilt rættarmál á veg, tí bæði Parken Sport & Entertainment og DBU krevja milliónа upphæddir frá manninum fyri mistar inntøkur.

**-nud**

# KROSSORÐ




## Vinnari:

*Jens Lisberg*
*Klokkaragøta 26*
*100 Tórshavn*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: SANNLEIKIN

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| S | K | Æ | L | I | N | G | S | F | J | A | L | L | | S | O |
| T | Æ | R | | N | E | B | O | | A | L | | H | A | N | S |
| Ó | R | A | | G | O | | D | U | R | I | T | A | | Ó | K |
| R | A | N | K | I | N | | A | M | I | N | O | S | Ý | R | A |
| A | M | | R | | | T | | M | | | R | A | | A | R |
| F | A | M | I | L | J | U | M | A | Ð | U | R | | T | T | |
| J | M | | T | E | O | | A | N | | N | I | G | E | R | |
| A | M | E | R | I | K | A | N | A | R | I | | G | R | Æ | T |
| L | A | D | O | G | A | | I | K | | V | G | | A | | Ø |
| ØL | | I | K | A | R | O | S | | D | E | A | N | | E | M |
| 516 | L | S | | R | I | N | K | A | | R | L | | Á | S | A |
| L | E | O | N | | N | | U | R | | S | L | A | G | | |
| A | G | N | A | S | | T | R | E | K | I | R | | Ó | | I |
| T | U | | K | A | S | T | | S | | T | Ó | R | Ð | U | R |
| U | N | I | K | U | M | | N | | R | E | P | R | I | S | A |
| GR | A | N | I | | Á | R | L | A | | T | | R | N | A | |

## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

**517**

**Loysunar-orðið:** ............................................

Navn: ..............................................................

Bústaður: .....................................................

Bygd/býur: ....................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

### Frá *BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:*

- ☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

### Frá *FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:*

- ☐ **Heimsatlas**
- ☐ **Føroysk Flora** – *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** – *Bogi Hansen*
- ☐ **Heimsins lond**
- ☐ **Grót og steinar** – *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***